## Finalistar hittast

Finalistarnir í ensku steypakappingini Carling Cup í fjør hittast í fjórðingsfinaluni í kappingini í ár. Manchester United og Tottenham skulu spæla ímóti hvørjum øðrum á Old Trafford. Chelsea skal spæla á útivølli ímóti Blackburn, Arsenal skal spæla ímóti Manchester City, og seinasta fjórðingsfinalan verður ímillum Portsmouth og Aston Villa.



## Drogba er tann besti

Chelsea-miðvallarin Frank Lampard heldur, at liðfelagin Didier Drogba er besti álopsspælarin í heiminum. Tað sigur Lampard, eftir at Drogba hevur víst stórform seinastu vikurnar. - Drogba er ein spælari í heimsflokki, og hann er í stórformi í løtuni. Eg haldi, at Drogba er tann besti álopsspælarin í heiminum, tí hann er so fjølbroyttur í sínum spæli, sigur Frank Lampard við blaðið Sporting Life.

# Føroyskt samba-gull í Danmark

**10 ára gamla Luisa Sofía Eliasen vann um vikuskiftið DM-heitið í samba í elitubólkinum fyri børn undir 12 ár**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Samba er kanska ikki tað, sum mest verður gjørt við í Føroyum, hóast vit fyri góðari viku síðani sóu grein í Sosialinum um millum annað sambafrálæru. Men hjá 10 ára gomlu Luisu Sofíu Eliasen, sum er dóttir Boga og Giselu Eliasen, og sum býr í Århus, hevur dansur fylt nógv seinastu árini.

Luisa Sofía er elitudansari, og um vikuskiftið tók hon lut í DM-kappingini í latin og samba saman við dansipartnara sínum, Tore Lund.

Hóast bæði Tore og Luisa Sofía hava dansað í nógv ár, hava tey einans dansað saman í tríggjar vikur, og tí høvdu tey ikki roknað við, at tey skuldu endað heilt frammi í oddinum. Men tá kappingin var av, høvdu tey bæði vunnið sær gull í samba og silvur í latíndansinum, so heilt av leið var tað nú slettis ikki.

### Heimsins bestu venjarar

Århus hevur seinnu árini verið mettur sum ein av fremstu dansibýunum í Evropu, og tí er býurin mest sum fastur venjingarstaður hjá fleiri av fremstu dansarunum í heiminum. Og tað hevur eisini givið framúr venjingarmøguleikar hjá Luisu Sofíu og Tore.

Millum føstu venjarar teirra kunnu nevnast Marianne Eihilt og Mads Vad, sum eru kend frá »Vild Med Dans«, og Lene James, sum var fyrsti danski heimsmeistarin í dansi.

Sum persónligar venjarar hava Tore og Luisa Sofía parið Bjørn Bitsch úr Danmark og Ashli Williamson úr Australia. Tey hava í heyst hava vunnið silvur í EM og HM í 10-dansi, sum er kapping í bæði latin- og standarddansi. Og tey bæði liggja í løtuni ovast á alheims styrkilistanum fyri dansipør.

Næst á skránni hjá Luisu Sofíu og Tore er DM í standarddansi, sum verður í Køge um tríggjar vikur.



Luisa Sofía Eliasen og Tore Lund vóru besta dansiparið í flokkinum undir 12 ár, tá DM í latín og samba var í Odense leygardagin

# Arek Onyzko gevur bók út

**Pólski málverjin langar hart út eftir kvinnuligum ítróttarjournalistum í bókini. Hann sigur tær einki skil hava fyri fótbólti**



heri@sosialurin.fo
Heri Simonsen

Nógv rok hevur verið um pólska málverjan hjá FC Midtjylland, Arek Onyzko, sum fyrr hevur vart málið hjá Viborg og OB í bestu donsku fótbóltsdeildini. Nú hevur póllendingurin givið út eina sjálvsævisøgu, sum hann hevur givið heitið "Fucking Polak". Bókina hevur hann skrivað í samstarvi við danska journalistin, Steffen Moestrup.

Partur av bókini handlar um blóðuga stríðið, sum var millum Arek Onyzko og fyrrverandi konuna, Onnu. 22. mars í ár kom veruliga til illnar millum tey bæði. Anna stakk Arek við einum breyðknívi, og rakti hon hann bæði í magan og í búkin, men tíbetur ikki so meint. Alt endaði við, at Arek slerdi konuna, og hann fekk ein treytaleysan valdsdóm fyri tragisku hendingina. Hendingin fylti sera nógv í donsku miðlunum. Kortini sær Onyzko uppá donsku miðlarnar, sum bæði sín vin og sín fíggjinda.

### Kvinnuligir ítróttarjournalistar

Í bókini langar Onyzko harðliga út eftir kvinnuligum ítróttarjournalistum. Onyzko sigur seg ikki skilja hvussu tað ber til, at tað eru so nógvir kvinnuligir ítróttarjournalistar. Eftir hansara tykki, so tykjist tað sum um, at allir studiovertirnir í ítróttarsendingunum skulu vera kvinnur. Og hann spyr, um tað bara er, tí tær síggja so gott út? Og tann góða útsjóndin skal gera tað lættari at "lokka" svar burtur úr fótbóltsspælarunum. Onyzko sigur tað svara til, at hann sjálvur skuldi gjørt viðmerkingar til hondbólt, sum hann einki skil hevur fyri. – Tær hava jú aldrin sjálvar spælt fótbólt, so hvat f.... skal eg tosa við tær um? Spyr pólski málverjin.

Í bókini langar Onyzko eisini út eftir leiðsluni í OB, sum hann sigur heldur ikki hava skil fyri fótbólti. Onyzko heldur tað vera sinnissjúkt, at fólk sum einki skil hava fyri fótbólti skulu hava so stórt vald í danska fótbóltsheiminum. Hann hevur avgjørt, at fólk sum ikki hava skil fyri fótbólti, skulu tiga.